# Mjús 2006 – vátt men gott!



**Mjús fer í søguna sum hin vátasti festivalurin í Føroyum nakrantíð. Men hóast ta váta veðrið, so riggaði Mjús bara heilt væl. Tiltakið var breitt og var ætlað øllum aldursbólkum. Eini 2000 fólk høvdu leitað sær á Mjús, men hesi 2000 komu ikki fyrr enn ímóti endanum**

MJÚS
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Allur dagurin var merktur av tí nógva regninum, sum hevði við sær, at fólk settust aftur. Hetta var spell, men veðrinum ráða vit ikki yvir. Tó skal sigast, at tiltakið var væl fyriskipað. Har var rættur festival hýrur á sandinum, og øki er eitt hitt vakrasta í landinum. Men tá ið tað regnar av grimd, er tað torført at fáa fólk frá húsum. Tað nógva fólkið bíðaði inntil høvuðsnavnið, Bonnie Tyler, skuldi á pallin. Tískil var rættiliga tómligt áðrenn hon kom á pallin, og hetta hevði við sær at hin rætti, hugnaligi festivalhýrurin ikki ordiliga til sjóndar fyrr enn seint á kvøldi.

Tónleikurin var framførdur á tveimum ymiskum pallum. Ein stórur pallur og ein lítil pallur. Flestu framførslurnar á stóra pallinum komu ikki til sín rætt, tí at øki var so stórt, og áhoyrararnir so fáir. Men konsertirnar á lítla pallinum riggaðu betri, tí at har tóktist ikki so tómligt. Har kendi tú eitt sindur av tí rætta festival hýrinum.

Tónleikurin á Mjús, var annars á eini góðari leið. Mjús er ætlað einari breiðari fjøld. Har skal vera okkurt til børn, okkurt til tey ungu og okkurt til tey tilkomnu. Út frá teimum kriterium haldi eg, at tey tónlistarligu tiltøkini vóru væl vald. Spell at Poppkorn máttu geva avboð. Genturnar í Poppkorn eru sera væl umtóktar millum børn og ung, so hetta var ein strika í rokninigini.

Av tónleiki til tey yngru var tað kanska serliga norska Marit Larsen, sum skuldi vera flaggskipið. Hennara partur lá heldur ikki eftir, men tó var tað spell, at tað ikki vóru fleiri áhoyrarar at hoyra hesa dugnaliga songkvinnu og hennara frálíka bólk.

Onkur viðurskifti vóru tó eitt sindur óheppin. Eg helt tað vera sera keðiligt at wc var so langt frá festivaløkinum. Tú mátti ganga út av økinum, fyri at finna skúrin, og var hetta setti eitt lítið minus við heildar upplivingina. Sjálvandi skulu vit eisini vísa á, at seinkingar vóru í skránni, men hartil skal so eisini sigast, at fyrireikararnir høvdu alt óheld í heiminum ímóti sær, viðv. Bonnie Tyler. Hon var út fyri eini rúgvu av óhepnum hendingum á hennara ferð til Sands, og hetta er bara slíkt, sum kann koma fyri.

Tað er gleðiligt, at festivalarnir hava fingið loyvi at skeinkja. Ongastaðni lógu ølfløskur og sløddust, og øki var sum heild rættiliga vinarligt at ferðast á. Tey mongu ruskíløtini gjørdu eisini sítt til, at øki var so ruddiligt, og eisini skulu fyriskipararnir hava rós fyri at hava syrgt fyri hesum.

Fyriskipararnir skulu eisini hava rós fyri, at festivalurin var so fjølbroyttur. Sjálvt um tónleikurin fylti nógv í myndini, so vóru fleiri góð og áhugaverd tilboð, til teirra sum vildu hava eitt sindur meir fyri pengarnar. Serliga hugsi eg um tey mongu mattilboðini og barnatiltøkini. Eisini var tað sera gott, at Teistin sigldi so týtt yvir um fjørðin. Sum vitjandi hevði tú fleiri møguleikar í samband við ferðing, og hetta er júst tað sum krevst í dag.